

*Tað var eingin ivi, tá Blikur púra einsamallur fór fyrstu um málstrikuna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Nú hevur Blikur lagt seg á odda

**Eftir trilvandi fyrsta róðurin hevur tað bara gingið framá hjá argjagentum, sum eru einasta FM boðið hjá felagnum**

5-MANNAFØR GENTUR

*Jóannes Hansen*

Í fjør varð Blikur av Argjum FM vinnari í kappingini millum 5-mannafør við gentum. Í fyrraárið var tað Drekin hjá Havnar Róðrarfelag, sum var meistari.

Enn er kappingin fyri í ár ikki komin meiri enn gott og væl hálva leið. Men tað er eingin ivi um, at meistarin verður meistarin í fjør ella meistarin í fyrraárið.

Eftir róðurin á Varmakeldu er tað Blikur, sum er best fyri. Argjagenturnar eru fyri fyrstu ferð í ár á odda. Tær eru tvey stig undan Dreka gentunum. Á Norðoyastevnu kiksaði tað fullkomuliga hjá Bliki. Ta ferðina vann Drekin. Síðani hevur Blikur vunnið hvørja ferð, og Drekin hevur verið næstfremstur.

Sigurin hjá Bliki var ikki so sannførandi á Varmakeldu, sum hann var á Jóansøku, men úrslitið sigur, at tað skal nógv til fyri at taka Blik. Á Trongisvágsfirði var hann tíggju sekund undan Drekanum, og hesa ferð var hann stívliga fýra sekund ella meiri enn eina bátslongd frammanfyri Drekan.

Í fjør vann Argja Róðrarfelag trý FM heiti - Blikur við dreingjum og gentum og so við Argjabátinum, sum var besta 8-mannafarið. Í ár tykist tað bara vera gentumanningin umborð á Bliki, ið verður før fyri at endurtaka bragdið.

Um tað skal eydnast Dreka gentunum at órógva kósina hjá Bliki ímóti FM heitinum, so verður tað neyðugt hjá teimum í Havnar Róðrarfelag at gera nakað við Blik á Skála nú leygardagin. Út frá úrslitunum í fýra teimum fyrstu kappingunum, so bendir einki á, at nakar annar skal vinna fremsta plássið í FM kappingini. Men avrikið í Fuglafirði kundi bent á, at onkur annar fer at blanda seg í stríðið um fremstu plássini á Skála.

Havfrúgvin úr Vestmanna, sum er einasta manningin, ið luttekur í FM kappingini úr stoltu róðrarbygdini, vann leygardagin triðja plássið. Hetta var besta úrslitið hjá teimum í ár, og tað var ikki so langt fram til næstfremsta plássið. Drekin var minni enn eitt hálvt sekund undan Havfrúnni.

**Úrslit**

| | |
|---|---|
| 1 Blikur | 05:20.02 |
| 2 Drekin | 05:24.21 |
| 3 Havfrúgvin | 05:25.15 |
| 4 Tjaldrið | 05:28.11 |
| 5 Tekla | 05:30.22 |
| 6 Erla Kongsdóttir | 05:42.00 |

# Eysturoyingur setti nýtt met



*Við triðja sigrinum av fýra møguligum hevur manningin á Eysturoyingi nú sett beina kós móti FM-heitinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Bæði vinnarin og Nólsoyingur, sum hesa ferð aftur setti seg á næstfremsta plássið, róðu skjótari, enn nakað 10-mannafar áður hevur gjørt á Fuglafirði**

10-MANNAFØR

*Jóannes Hansen*

Eysturoyingur var enn eina ferð tryggur vinnari í kappingini millum 10-mannaførini. Harvið bendir alt á, at hann fer at vinna FM heitið.

Eysturoyingur var fremstur eftir startspurtin, hann var fremstur, tá ið tað varð farið undir endaspurtin, og hann var fremstur á endamálinum.

Fjarstøðan aftur til Nólsoying, sum hesa ferð aftur tók næstfremsta plássið, eftir at Hoyvíkingur hevði lænt tað á Jóansøku, var ikki meiri enn ein hálv bátslongd. Tað var væl minni, enn hon var aftur til Hoyvíking, tá ið Eysturoyingur á Trongisvágsfirði róði uppvísningsróður. Men tað var eingin ivi um, hvør fór at vinna.

Kappingin ímillum teir báðar fremstu bátarnar á Varmakeldu fyri tveimum árum síðani er næstan vorðin tiltikin. Ta ferðina fór Nólsoyingur fyrri undir endaspurtin enn guli báturin, og tað eydnaðist nólsoyingum at taka seg eitt vet framum, áðrenn teir umborð á Eysturoyingi setti føtur í bekk og vunnu.

Hesa ferð var gongdin tann sama. Nólsoyingur fór eitt sindur fyrri undir endaspurtin. Hann tók seg nakað fram, men tað eydnaðist honum ikki at hótta Eysturoyingin. Havnarbáturin og Hoyvíkingur vóru meiri enn tvær bátslongdir aftanfyri Nólsoyingin. Kappingin ímillum teir báðar var so mikið tøtt, at tað - hóast digitala og framkomna útgerð - ikki bar til at taka dagar ímillum, hvør at teimum var fremri. Tí fingu bæði Havnarbáturin og Hoyvíkingur triðja plássið og harvið fýra stig í part. Vágbingur var hesa ferð hálva bátslongd frá triðja plássinum, meðan Skálabáturin væl og virðiliga helt seg á sætta plássinum.

Tað vóru fín róðrarlíkindi í Fuglafirði leygardagin. Tá ið fasti starturin varð fluttur av 1000 metrum og út á 1500 metrar, hevði vindurin hug at vaksa eitt sindur. Hann var undan, og harvið vóru fyritreytirnar fyri góðum tíðum betri, enn tær ofta hava verið.

Eysturoyingurin setti nýtt Varmakeldumet leygardagin. Tíðin var 8.42.12. So góða tíð hevur einki 10-mannafar nakrantíð havt á Fuglafirði. Metið frammanundan stavaði - sambært fínu hagtølunum á heimasíðuni drekin.fo - frá 1999. Ta ferðina var vinnaratíðin 8.51.02, og eisini ta ferðina var Eysturoyingur, sum vann allar róðrarnar og harvið FM, bestur.

Eisini Nólsoyingur megnaði hesa ferð at gera av við gamla metið. Tíðin hjá honum var 8.44.20 ella næstan sjey sekund betri, enn gamla metið frá 1999 var.

**Úrslit**

| | |
|---|---|
| 1 Eysturoyingur | 08:42.12 |
| 2 Nólsoyingurin | 08:44.00 |
| 3 Havnarbáturin | 08:52.11 |
| 4 Hoyvíkingur | 08:52.11 |
| 5 Vágbingur | 08:55.03 |
| 6 Skálabáturin | 09:00.14 |

# Sílið svimur fyri seg sjálvt

**HR manningin vinnur hvørja ferð, og tá ið allir hinir bátarnir taka frá hvørjum øðrum er lítil ivi um, hvørja kós FM heitið hevur**

5-MANNAFØR KVINNUR

*Jóannes Hansen*

Tað er eingin ivi. Fyrsta meistaraheitið í nýggju kappingini millum 5-mannafør við kvinnum, fer at enda í Havnar Róðrarfelag. Tað syrgja kvinnurnar umborð á Sílinum fyri.

Tær hava verið sannførandi vinnarar í øllum fýra kappingunum, sum higartil hava verið. Og tá ið hinir bátarnir taka stig frá hvørjum øðrum, so skal rættuliga nógv til, um Sílið nú skal missa fremsta plássið. Sílið hevur fult stigatal - 28. Blikur er næstfremstur við 18 stigum, og so er stórt glopp aftur til Fípuna Føgru og Frúnna, sum hava 12 stig.

Á Jóansøku endaði Frúgvin, ið var merkt av skaðanum, sum báturin fekk stutt undan róðrinum, sum nummar fýra. Ta ferðina var Miðvágs báturin níggju sekund aftanfyri Sílið.

Hesa ferð var Sílið aftur fremst, men nú var munurin aftur til Frúnna tvey sekund ella minni enn ein bátslongd. Fjarstøðan frá Frúnni og aftur til Blik var minni enn hálv bátslongd, og Firvaldur megnaði við fjórða plássinum at vinna bestu endastøðuna í ár.

Merkisvert var tað eisini, at róðrartíðin hjá Sílinum hesa ferð var meiri enn 38 sekund styttri, enn hon var tað á Jóansøku. Hesa ferð var ættin undan, meðan hon á Jóansøku var ímóti.

**Úrslit**

| | |
|---|---|
| 1 Sílið | 05:10.01 |
| 2 Frúgvin | 05:12.03 |
| 3 Blikur | 05:13.16 |
| 4 Firvaldur | 05:14.14 |
| 5 Fípan Fagra | 05:15.19 |
| 6 Drekin | 05:16.14 |
| 7 Ørnin | 05:19.09 |
| 8 Ritan | 05:20.02 |
| 9 Royndin Fríða | 05:22.08 |
| 10 Junkarin | 05:28.13 |
| 11 Falkur | 05:42.0 |